# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Hugsjónarmaðurin Hensar Ellingsgaard farin



Mánadagin komu deyðsboðini av Hensari Ellingsgaard. Hann hevur verið illa sjúkur leingi, og bundin at song og koyristóli, hjálp og umsorgan, og illa darvaður av støðugt viknandi samskiftisførleika við onnur. Tó kendust boðini sum ein sviði. Ein vinmaður í eitt mannaminni var farin.

Hensar kom til Sandavágs at læra til bakara, tá ið eg var lítil smádrongur. Onkuntíð sendi mamma meg norð til Rigmor at keypa vinarbreyð, og tá var Hensar viðhvørt í handlinum.

Tá ið eg sá hann aftur, var hann framburðshugaður og væl lýddur fyrstilærari norðuri á Viðareiði og seinni lærari og skúlastjóri vesturi í Sørvági.

Tíðliga í sjeytiárunum vóru vit eitt skifti samstundis niðri í Danmark í lestrarørindum og sóust javnan.

Tað árið var stór skúlamessa í Brussels, og vit løgdu avstað, tríggir føroyskir lærarar, við kampingbili úr Keypmannahavn, at síggja tað nýggjasta, sum Europa hevði at bjóða av innbúgvi, amboðum, tólum og undirvísingartilfari.

Hensar fylgdi væl við í tí sum hendi á skúlaøkinum í londunum uttanum okkum, og fáir lærarar í okkara ættarliði munnu hava lisið so nógvar pedagogiskar bókmentir sum hann. Hann gjørdi meg ofta bilsnan við síni stóru og víttfevnandi vitan og sínum hugburði til pedagogiskt arbeiði. Barnsins frami var altíð fremst í huga hansara. Í sínum hugsjónum um skúla, undirvísing og uppaling var hann langt frammanfyri sína tíð, og hevði sítt knoss við at fremja nakrar av hesum tonkum í verki, sjálvt tá ið hann í bestu mandómsárum kom á ovastu rók í útbúgvingarverkinum, fyrst sum fulltrúi í Landsskúlafyrisitingini og seinni sum landsskúlastjóri.

Afturhaldið vildi øðrvísi enn hann, og afturhaldið er sterkasta vald í Føroyum, tað hevur so mangur framtakshugaður føroyingur sannað.

Hann segði tað so rámandi sjálvur einaferð í 70-árunum. Vit høvdu fingið nýggjar karmar um virksemið í 10. flokki. Hann lýsti støðuna við einum setningi og segði: “og so settu vit gomlu hurðina í aftur”.

Hensar var arbeiðsamur sum fáur, setti seg væl inn í øll mál, og hann var skjótur at avgreiða tað, sum hann hevði við at gera. Smidligur í huga og verki. Tol og tolsemi merktu hansara samband við onnur.

Hensar fór frá fyri aldur fyri 8 árum síðani og gleddi seg til at fáa stundir til tað, sum hevði ligið á láni í einum virknum arbeiðsgerandisdegi. Men vit vita ikki, hvat ið liggur og lúrir eftir okkum. Hensar fekk ikki heilsuligar umstøður at vera virkin hesi seinastu árini.

Hugin leitar til tín, Gretu, sum hevur mist so nógv, og til genturnar, abbabørn og tykkara næstu.

Hvíl í friði, góði vinur. Tú hevur sett spor eftir teg í okkum, sum kendu teg.

**Pauli Nielsen**

## Tøkk



Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá kæri maður mín og pápi okkara, sonur, beiggi,
versonur og svágur okkara

**Hilbert Martin Blástein**

so brádliga varð tikin frá okkum.

Ein serlig tøkk til skipara og manning á Polarhav,
sum vóru um hann. Eisini ein serlig tøkk til Petur
Fonsdal, Osmund Justinussen og Poul Færø fyri
góð og troystarrík orð.
Tøkk til Martin Joensen og Torkil Mørkøre fyri sang
og fylgjuspæl og til berararnar.
Ein hjartans tøkk til bygdafólkið og onnur, sum
hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Tøkk fyri blómur, kransar, vitjanir og gávur.
Ein tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til
hansara seinasta hvíldarstað
ynskja vit við Matt. 25,40

*Familjunnar vegna*
**Rannvá og børnini**

*Orð rúma ikki takksemi, vit kenna í hjørtum okkara.*

## Johan Joensen 60 ár



**Verðins besti Pabba**

*Lívsins fyrsta sjón - eygu blá og blíð*
*Hendur sterkar og hjarta stórt*
*Altíð okkum hava hjálpt og vart*
*Víst á trygga havn*

*Vísur, álítandi og ágrýtin alla tíð*
*Okkum lært um smátt og stórt*
*Vóni okur enn hava nógv bjart*
*Frammanfyri stavn*

**- Tínar tríggjar døtur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt hjálptu
og sýndu samkenslu, tá okkara elskaða dóttir, kona,
mamma, vermamma og omma okkara

**Susan Andreassen**
Toftir

andaðist og varð jarðað.

Ein stór tøkk til tykkum á B6.
Tøkk til Sverra Steinhólm, prest, fyri góð og rík
orð í kapellinum.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu okkum í hesi svári
tíð, og ein stór og innilig tøkk til tykkum mongu,
sum fylgdu Susan til hennara seinasta hvíldarstað.

*Heilsan*
**Bergtóra, Andrias,**
**Pia, Kristina og Kristian Anton**